Heini Weihe selir egi› sni›

Dentur ver›ur lagdur á hava ergonomiskt gó›ar møblar, sum samstundis skulu hava eitt vakurt sni›. Ergo Design lat upp mánadagin á Tinghúsvegnum, har møguleiki eisini ver›ur fyri at bíleggja serjørt innbúgv

ERGONOMI
Stefan í Skorini

Tá tú trínur inn í handilin, stendur ein stólur mitt á gólvinum, sum mest líkist eini skur›mynd. Ta› s‡nist eisini at vera eitt ikki sørt listarligt umhvørvi, tí á vegginum hanga fleiri málningar hjá Amarieli Nor›oy.

Ta› er 28 ára gamli havnarma›urin Heini Weihe, sum einsamallur fer at standa fyri handlinum. Hann er møbilsnikkari og er eisini júst li›ugur á Danmarks Designskole.

Nú fer hann undir at selja skrivstovuinnbúgv, og dentur ver›ur lagdur á, at ta› ikki skal ovbyrja kroppin í longdini. Eisini ver›a a›rir vanligir møblar seldir.

Eitt verksta› er aftanfyri handilin, har Heini ger bor›pláturnar, sum hann sjálvur hevur designa›. Eisini er møguleiki at bíleggja sergjørt innbúgv sum reolir o.a., um onkur hevur serligan tørv.

Heini Weihe og unnusta hansara vi› eitt av bor›unum, sum Heini sjálvur hevur designa›

Mynd: Jens Kr. Vang

Egi› sni›

Heini selir sítt egna sni›. Øll bor›ini, sum standa í handlinum, hevur Heini sjálvur tekna› og gjørt. Okkurt av bor›stellunum er eisini hansara, men tey ver›a gjørd ni›ri í Danmark av Ergonomecs, sum føroyingar eiga.

Umframt skrivstovubor›ini fer Heini eisini at selja stólar av merkjunum Stokke og Savo.

Handilin er í hølunum, har Rokkjallarin fyrr var, og ta› var eitt stórt arbei›i at gera hølini klár til n‡ggja handilin, men nú síggja tey ógvuliga snøgg og hugnalig út.

Fyritøkan Formula eigur bygningin og eigur eisini tri›ingin av handlinum. Hinar bá›ar tri›ingarnar eiga Heini og Ergonomecs.

Magnus og Sverri ansa eftir umhvørvinum



Magnus (hm) og Sverri eru nú vónandi vor›nir meira varugir vi› umhvørvisvernd og fara í framtí›ini at gera naka› vi› trupulleikan, sum vit hava í Føroyum av ov stórum nøgdum av burturkasti

Mynd: Jens Kr. Vang

Saman vi› floksfeløgunum hava Magnus og Sverri seinastu tí›ina havt umhvørvi› undir sjóneyku, og teir halda ta› vera umrá›andi, at vit ansa betri eftir okkara umhvørvi og náttúru enn vit gera nú

UMHVØRVI
Stefan í Skorini

13 ára gomlu Magnus Fredrik Joensen og Sverri Strøm, sum bá›ir ganga í 7. flokki í Kvívíkar skúla, hava saman vi› flokkinum sæ›, hvussu ta› ber til at endurn‡tta gomul blø›.

Flokkurin hevur sjálvur gjørt pappír úr gomlum blø›um, sum annars høvdu fari› beina lei› ni›ur í ovnin á brennistø›ini.

– Vit petta›u gomul blø› sundur, og blanda›u ta› væl vi› vatni. Vit lótu ta› standa í ein dag og løgdu ta› í formar. Sí›ani var› ta› slætta› og lagt undir tr‡st fyri at fáa vætuna burturúr. So var› ta› bara hongt upp at turka, siga teir bá›ir.

Eftir standa teir vi› pappíri, sum kann n‡tast til ymisk endamál, og ta› tók teimum nakrar fáar dagar at gera pappíri›.

Einki slíkt ver›ur gjørt í Føroyum í løtuni uttan úti í Skúvoy. Um pappíri› var› endurn‡tt, so hev›i nøgdin av burturkasti minka› mundandi.

Flokkurin hevur víst á, hvussu ta› ber til at verja umhvørvi› vi› at endurn‡tta burturkast. Ta› er so, at ein stórur partur av okkara burtkasti er pappír ella papp, sum lættliga kann endurn‡tast.

Brennistø›in á Hagaleiti fer nú undir at endurn‡tta pappír, og teir meta, at nøgdin fer at vera millum f‡ra og átta túsund tons, sum kunnu endurn‡tast, av teimum 16.500 tonsunum, sum árliga ver›a brend.

Magnus og Sverri eru samdir um, at ta› er umrá›andi, at vit fara undir slíkar verkætlanir í Føroyum, tí annars ver›ur ta› umhvørvi›, sum fer at blø›a fyri ta› og í sí›sta enda vit.

Nú IRF um stutta tí› fer undir at endurvinna pappír, ætla teir sær bá›ir at syrgja fyri, at ta› rætta burturkasti› fer í teir røttu posarnar, so at vit í Føroyum eisini kunnu fara at endurn‡tta burturkast.

Flokkurin í Kvívíkar skúla hev›i eisini ætlanir um at fara undir at skilja burturkast úr ruskílatinum heimifrá, men tey vóru einki fyri at fara í aftur ílati›, har alt var› tveitt burtur.

Ein hugbur›sbroyting krevst, um vit skulu fara undir at endurvinna burturkast.

Hvat ver›ur av ruskinum?

Brennistø›in í Leirvík fer í næstum undir at endurvinna naka› av tí ruskinum, sum annars hev›i veri› brent í ovninum. Hetta er í tøkum tíma, tí ney›ugt er her at arbei›a 24 tímar um samdøgri› fyri so dánt at hóra undan vi› teimum stóru mongdum av ruski, sum hvønn dag ver›a koyrdar hagar

RUSK
Stefan í Skorini

Ta› er umrá›andi, at fólk gerast varug vi› fyrimunirnar vi› endurn‡tslu og fara at gera sítt besta vi› at syrgja fyri, at ta› burturkasti› fer í tann rætta posan

Mynd: Jens Kr. Vang

Hvørt ár ver›a eini 16.500 tons av burturkasti brend í ovninum í brennistø›ini á Hagaleiti sunnanfyri Leirvíks bygd. Onnur 15.000 tons ver›a brend á brennistø›ini á Sandvíkahjalla. Tískil skulu fleiri enn 30.000 tons av burturkasti brennast á hvørjum ári í Føroyum.

Hetta merkir, at ovnarnir eru í gongd alt samdøgri› alt ári› fyri at fáa alt ruski› burturbeint.

Okkurt má gerast, tí ikki ber til at liva vi› hesi stø›uni í longdini. Nøgdin av burturkasti var bara 12.000 tons í byrjanini, tá brennistø›in fór í gongd, men er nú økt til 16.500 tons. Eitt er at økja um brenniorkuna, so at enn meira burturkast kann brennast, men hetta hev›i veri› ein sera kostna›armikil loysn.

Eitt anna› er at minka um nøgdina av burturkasti, og hetta er avgjørt ein gongd lei›. Hetta ver›ur gjørt vi› at endurvinna burturkasti›.

Ein stórur partur av ruskinum kundi veri› endurn‡ttur, og brennistø›in hjá IRF fer eisini undir at endurvinna pappír í næstum. Arbei›i› at gera eina høll er byrja›, har mest pappír og papp skal endurvinnast. Fólk í kommunum, sum eru í IRF, fara tá at fáa tveir posar til burturkasti›, ein vanligan og ein til pappír.

Mett ver›ur, at millum 4.000-8.000 tons av burturkastinum kunnu endurvinnast árliga. Hetta kann gerast næstan helmingurin av ruskinum, og ta› fer at muna væl í rúgvuni, sum eftir hetta fer í ovnin.

7. flokkur í Kvívíkar skúla hevur arbeitt vi› spurninginum um, hvagar alt fer, sum vit tveita burtur, og hvussu ta› ber til at gagnn‡tta og endurvinna rusk. Ein túrur til Brennistø›ina hjá IRF á Hagaleiti var tí sjálvsagdur. Tey hava millum anna› gjørt pappír úr ø›rum pappíri, sum annars hev›i ver›i› tveitt burtur.

Endurn‡tsla er framtí›in

Ta› ver›ur mett, at vit í Føroyum eru eini 10-20 ár aftanfyri okkara grannalond, tá talan er um at endurn‡tta burturkast okkara. Í Danmark hevur burturkast ver›i› endurn‡tt í mong ár, men vit eru ikki komin í gongd vi› hetta enn.

Broytingar eru tó fyri framman, tá ein endurn‡tsluhøll ver›ur tikin í n‡tslu. Skúlabørn hava nú eisini víst vegin, sum avgjørt er ein gongd lei›.

Ta› vísir seg at vera torført at fáa fólk í Føroyum at skilja t‡dningin av, at fari› ver›ur undir at endurvinna rusk. Myndugleikarnir hava heldur ikki veri› beinlei›is raskir at skunda undir hesa gongdina. Tó er ein kompostskipan sett upp í Skúvoy. Í løtuni eru umhvørvismál undir kommunum, og tí avgera tær sjálvar, hvussu tær handfara máli›.

Lærari hjá børnunum er Bjarni Heinesen, og hann sigur, at ætlanin vi› umhvørvisætlanini hjá flokkinum er at gera børnini meira varug vi› vandarnar umhvørvisdálking.

Víst ver›ur í undirvísingini á, at ta› væl ber til at endurvinna ta› mesta av burturkastinum, men at hetta ikki ver›ur gjørt í løtuni.

Nógv av tí, sum vit í dag kasta burtur, skuldi av røttum fari› útaftur í náttúruna, ísta›infyri at ta› ver›ur brent.

Koma nærri veruleikanum

Vi› hesum túrinum á brennistø›ini metir lærarin, at næmingarnir koma nærri veruleikanum á hesum økinum. Vit tveita hvønn dag nógv burtur, men vit síggja ta› ongantí› aftur. Á brennistø›ini síggja børnini, hvat ver›ur av ruskinum.

Veruleikin er eisini tann, at ta› er mark fyri, hvat brennistø›irnar kunnu klára, og vit nærkast tí markinum alsamt.

Færøernes Kommando og Flyvastation Tórshavn leggja saman

Bá›ir stovnarnir ver›a 1. januar næsta ár lagdir saman til ein myndugleika, sum skal eita Færøernes Kommando

SAMANLEGGING
Stefan í Skorini

Í avtalu frá 25. mai í 1999 vi›víkjandi skipan av verjuni var› gjørt av, at Færøernes Kommando og Flyvestation Tórshavn skulu leggja saman. 1. januar næsta ár ver›a bá›ir stovnarnir ni›urlagdir.

N‡ggi myndugleikin ver›ur settur á stovn 1. januar 2001, og hann skal liggja í Mjørkadali.

Upprunaliga var ætlanin, at stovnarnir ikki skuldu leggja saman fyrr enn á heysti næsta ár, men valt er at skunda undir hesa ætlan.

Kommandør Jesper Dinesen er valdur at vera yvirma›ur á n‡ggja stovninum. Hann er eisini yvirma›ur á gamla Færøernes Kommando. Oberstloytnantur Erik Kabbeltved Præstegaard, sum er yvirma›ur á Flyvestation, ver›ur skipanarstjóri á n‡ggja stovninum.

Vegna samanleggingina skulu nakrar umfatandi umbyggingar fremjast í bygninginum í Mjørkadali. Rakstrarmi›stø›, flotaradio, skrivstovur og anna› skal gerast í nor›ara endanum.

Me›an umbyggingin fer fram ver›ur vanliga arbei›i› hjá Færøernes Kommando bæ›i í Mjørkadali og á Flyvestation Tórshavn. Væntandi ver›ur umbyggingin li›ug mi›skei›is í 2002.